

# Jenný vann teknikappingina

KAPPING

Tað var tann 11 ára gamla Jenný Joensen á Oyrareingjum í Kollafirði, sum vann teknikappingina í Sosialinum, har børn kundu tekna Kjøtkrók.

Jólamaðurin Kjøtkrókur hevur fingið allar myndirnar. Hann heldur, at myndirnar vóru sera góðar, og at tað var sera ringt at velja burturúr, men hepni vinnarin gjørdist so Jenný Joensen á Oyrareingjum.

Vinningurin er eitt gávukort á 1.000 kr frá einari av hesum fyritøkum: Hjá Gunnleivi, Føroya Banka, Statoil, BR-Leikum, Føroya Lívstrygging, Føroya Bjór, SMS, Tryggingarfelagnum Føroyar, Kall, Balslev, Føroya Tele, Skemmuni, MBM, Dadduni, FK, Rio Bravo, Nantong, Pizza 67, Farodane City, Cøruhúsinum á Hjalla, Føroya Sparikassa, Atlantic Airways, Bowling, Merlot, TelduTænastan, A. H. Jensen, Hjá Eli, Smúkkuhjørninum, Postverki Føroyar, Glas & Liset, ella Atlanticpane



*Gudny Langgardá Marknaðardeildini hjá Sosialinum trekti Sudokuvinnararnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Sudokufepurin hevur eisini rakt Sosialin

KAPPING

Fram til jóla hevði Sosialurin eina Sudokukapping, har møguleiki var at vinna eina nýmótans fartelefon frá Føroya Tele av merkinum Samsung E730 + eitt teletíðarhald. Samlaða virði er 3.295 kr.

Undirtøkan var sera stór, og fer Sosialurin undir eina nýggja Sudokukapping fyrst í komandi ári.

Hepni vinnarin av fartelefonini í kappingini var Sólvá Zachariassen í Sørvági.

Hon fær fartelefonina sendandi.


Umsorganararbeiði 2006

Sambært kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2005 um stuðul til umsorganararbeiði er freistin at søkja um stuðul til umsorganararbeiði fyri 2006 tann 31. januar 2006.

Umsóknir skulu sendast til
Almannastovuna, Smyrilsvegur 20,
Postsmoga 3096, 110 Tórshavn.

Sí annars www.almannastovan.fo

almannastovan

Vilt tú verða við til vøkstur og menning?

TRYGD er eitt tryggingarfelag í vøkstri, og fyri at styrkja tænastuliðið, søkja vit eftir ungum søluráðgeva.

**Hvør ert tú?**
Í TRYGD leggja vit størsta dentin á persónligar eginleikar og hugburðin hjá tí einstaka starvsfólkinum. Harnæst koma bókligu útbúgvingarnar og fakligi førleikin.

**Søluráðgevi**
· Tú hevur júst lokið ella ert í holt við seinasta partin av einari miðnámsútbúgving
· Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tú kanst samstarva og taka ábyrgd
· Tú ert í bestu árum, ert fyrikomandi og hevur lætt við at seta teg í samband við fólk
· Tú ert málsøkin og opin fyri broytingum
· Tú arbeiðir skjótt, skipað og torir at taka avgerðir
· Tú hevur dyggan handilsligan sans og hevur eitt munagott tænastu sinni

**Vit bjóða**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðingarnar eru nógvar. Høvið er sjálvsagt fyri framhaldandi, persónligari, eins væl og fakligari menning í einum livandi umhvørvi.

Sum starvsfólk í TRYGD, verður tú partur av áhaldandi menningini av felagnum og tær persónligu dygdir, ið tú hevur við tær inn í felagið, koma at gera sítt til at TRYGD gerst enn sterkari. Starvið verður sett og lønt eftir serstøkum sáttmála. Arbeiðstíðin er yrkadagar, millum kl. 16.00 og 22.00

**Umsóknir og starvsseting**
Starvið ynskjast sett skjótast tilber, men vit eru eisini sinnað at bíða eftir rætta viðkomandi. Skrivlig umsókn, við curriculum vitae og tilhoyrandi skjølum, skal vera okkum í hendi innan 15. januar 2006, skal sendast til:

P/F TRYGD
Att.: Ali Celebi
Gongin 7
Postboks 44
110 Tórshavn
Teldupostur: ace@trygd.fo

Trygd · Gongin 7 · Postboks 44 · FO - 110 Tórshavn · Tel. +298 35 81 00 · Fax +298 31 72 11
www.trygd.fo

TRYGD